UTTAN ÚR HEIMI

## Valdsstríð í Burma

Nógv bendir á, at eitt veruligt valdsstríð hevur tikið seg upp í Burma ella Myanmar, sum landið eisini eitur.

Í gjár vildu fleiri útlendskar tíðindastovur vera við, at Khin Nyunt, forsætisráðharri, var tikin ella koyrdur frá. Khin Nyunt, sum er fyrrverandi generalur, bleiv tilnevndur forsætisráðharri, stutt eftir at altjóða samfelagið fordømdi Burma, tí myndugleikarnir høvdu sett andstøðuleiðaran Aung San Suu Kyi í húsavarðhald. Stutt eftir at hann hevði tikið við, segði forsætisráðharrin, at hann ætlaði sær at virka fyri einari demokratiskari tilgongd, og at hann ætlaði sær at fara undir samráðingar við andstøðuleiðaran.

Myndugleikarnir í Teilandi søgdu í gjár, at støðan í Burma er spent. Teilendski forsætisráðharrin, Thaksin Shinawatra, segði við tíðindastovuna AP, at eitt ella annað er í ferð við at henda í grannalandinum, men at enn dugdi hann ikki at siga, hvat tað er.

## Selja burtur av Yukos

Í Russlandi hava myndugleikarnir gjørt av at selja ein part av stóra oljufelagnum Yukos, sum er komið í álvarssamar fíggjarligar trupulleikar orsakað av einari ovurstórari skattarokning. Russiska skattavaldið hevur kravt, at Yukos skal rinda 50 milliardir dollarar í skatti, og tað hevur felagið ikki ráð til.

Fyribils hava myndugleikarnir gjørt av at selja eitt gassfelag, sum Yukos eigur. Sambært tíðindastovuni Interfax er ætlanin at selja gassfelagið fyri góðar 20 milliardir krónur, men óheftir serfrøðingar siga, at felagið er nógv meiri vert á fría marknaðinum. Teir halda, at gassfelagið hjá Yukos er einar 60 milliardir krónur vert, men at myndugleikarnir hava sett prísin alt ov lágt, tí ætlanin er, at tað almena Gazprom skal keypa tað. Altjóða íløgubankin Dresdner Kleinwort Wasserstein, sum russisku myndugleikarnir bóðu gera eina meting av gassfelagnum hjá Yukos, kom til, at handilsvirðið liggur ímillum 85 og 100 milliardir krónur.

Russiskir fjølmiðlar hava teir seinastu dagarnar róð uppundir, at politikararnir í Kreml vilja hava ræðið á øllum tí russiska olju- og gassídnaðinum. Eitt av bløðunum skrivaði mánadagin, at í Russlandi hendir tað øvugta av tí, sum hendir aðrastaðni.

– Tess hægri oljuprísurin er, tess minni kostar tað at keypa russiska oljuídnaðin, skrivaði vinnulívsblaðið Vedomosti.

## Sjáldsom upptøka

Í einari goymslu hjá finska útvarpinum hava fólk funnið eina sjáldsama bandupptøku við Adolfi Hitler.

Á upptøkuni, sum varir átjan minuttir, tosar Hitler við finska generalin Mannerheim, sum var ovasti fyri finsku verjuni undir seinna heimsbardaga, og sum gjørdist kendur, tá Finnland vardi seg í krígnum við Sovjetsamveldið veturin 1939-40. Tað var ein teknikari, sum festi samrøðuna á band. Sambært finska útvarpinum hótti Gestapo við at avrætta mannin, tí hann hevði tikið samrøðuna upp, men tað eydnaðist honum at sannføra Gestapo um, at hann hevði oyðilagt bandið.

Tað sjáldsama við bandupptøkuni er, at hon er tann einasta, har Hitler tosar við náttúrligari rødd, sum sagt verður. Hinar upptøkurnar eru frá røðum, sum hann helt á fundum ella í útvarpi.

## Frelsunarherurin stevndur

Patti Davis, sum er dóttir fyrrverandi amerikanska forsetan Ronald Reagan, hevur stevnt Frelsunarhrinum, tí leiðslan har sýtti henni at halda ein fyrilestur, tí hon tekur undir við kyknukanningum.

Frelsunarherurin hevði biðið Patti Davis halda ein fyrilstur í Kalifornia tann 19. november, men herfyri fekk hon at vita, at hon sleppur ikki at halda fyrilesturin kortini, tí hon tekur undir við at loyva kyknukanningum, sum Frelsunarherurin er ímóti.

Patti Davis skuldi fáa 80.000 krónur fyri fyrilesturin, og nú hevur hon stevnt Frelsunarherinum eftir pengunum.

# Nú dystast teir um Florida



*Bush og Kerry dystast nú um teir 25 valmenninar í Florida, tí úrslitið har fer helst eisini hesaferð at avgera, hvør vinnur*

**George W. Bush og John Kerrry eru nú í Florida, tí úrslitið har kann eins og seinast gera av, hvør vinnur forsetavalið**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ætlanin var, at Bush og Kerry skuldu koma til Florida í síðsta mánað, men báðir vandaðu veður, tá tær nógvu tropisku ódnirnar herjaðu stórar partar av statinum.

Men nú eru teir komnir, og nógv bendir á, at Florida kann fáa sama týdning fyri forsetavalið hesaferð sum seinast. Veljarakanningar teir seinastu dagarnar hava víst, at tað stendur á jøvnum ímillum Bush og Kerry í Florida, 48 prosent í part. Støðan er tann sama í statunum Iowa og New Hampshire, men av tí at Florida hevur nógv fleiri valmenn enn hinir báðir statirnir, hevur úrslitið har størri týdning. Í gjár kundu teir fyrstu veljararnir í Florida greiða atkvøðu, og bæði valevnini hava heitt á sínar veljarar um at atkvøða nú.

Tað eru serliga teir nógvu latínamerikonsku veljararnir í Florida, sum valevnini stríðast um. Umleið ein fimtapartur av fólkinum í statinum er av latínamerikonskum uppruna. Veljarakanningar í øðrum statum hava víst, at har taka tey flestu "latinos" undir við Kerry, men at Bush er betur umtóktur ímillum latínamerikanararnar í Florida, sum yvirhøvur eru av kubanskum uppruna.

Kanningar í seinastuni hava víst, at Bush liggur stavnin framman fyri Kerry, tá tað snýr seg um prosentir, men at Kerry fær fleiri valmenn. Tað er tað seinna, sum er avgerandi. Sambært New York Times hevur Kerry tryggjað sær 221 valmenn, meðan Bush hevur 213. Á einari óheftari heimasíðu verður hildið, at lutfallið er 220-214, meðan ein republikonsk heimasíða væntar, at Bush fer at vinna valið við 274-264. yri at sleppa í Hvítu Húsini skal annað valevnið hava minst 270 valmenn.

# Aftur vandi fyri neyð í Etiopia

**Fólkatalið í Etiopia veksur ov skjótt, til at búskapurin klárar at fylgja við**

ETIOPIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Núi eru tvær milliónir fleiri fólk í Etiopia enn fyri einum ári síðani, men búskaparvøksturin hevur bara verið tvey prosent í sama tíðarskeiði.

Tað stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing, sum ST hevur skrivað um støðuna í tí eysturafrikanska landinum. Umleið 40 prosent av bruttutjóðarframleiðsluni í Etiopia stava frá landbúnaðinum, men fleiri miseydnaðar verkætlanir tey seinastu árini hava gjørt, at landið megnar ikki at útvega fólkinum nóg mikið av mati.

Í 1002 og 2003 høvdu umleið 13 milliónir etiopar ov lítið til matna, og ST vil vera við, at umleið 200.000 fólk, tey flestu børn, doyðu í hungri tá.

Fyrrverandi finski forsætisráðharrin Martti Ahtisaari er serligur ST-sendimaður í Etiopia og tess grannalondum, og hann sigur, at etiopisku myndugleikarnir noyðast at gera okkurt fyri at tálma fólkavøkstrinum. Hann vil eisini hava teir at geva umhvøvinum størri ans.

Í frágreiðingini hjá ST stendur eisini, at etiopisku myndugleikarnir gera sítt til, at sjúkur sum malaria gera meiri um seg enn neyðugt. Eitt nú taka tollmyndugleikarnir sær góða tíð til at avgreiða útlendskan heilivág.



# Uppvøkstur og menning hjá ættleiddum

Sunnukvøldið 24. november kl 20, skipar Ættleiðingafelagið fyri fundi á Parnassinum. Tveir fyrilestrar verða hildnir, og møguleiki verður eisini at seta spurningar. Ættlieiðingarforeldur, ættleidd og onnur áhugað eru vælkomin

Tað verða serliga tvey evni, sum verða umrødd á fundinum á Hafnia sunnukvøldið.

Tað fyrra evnið verður samleiki. Marianne Wung-Sung, sum er heilsusystur, fer at greiða frá, hvørjar hugsanir ættleid børn kunnu gera sær um samleikan. Til dømis við at barnið byrjar á stovni ella í skúla. Hon fer eisini at tosa um, hvat foreldur og onnur kunnu gera, fyri at stuðla menningini hjá barninum.

Næsta evnið, ið verður umrøtt, er heilsa. Barnalæknin Hans Trautner, fer at greiða frá um kanningar, sum verða gjørdar, fyri at fylgja upp uppá heilsustøðuna hjá barninum. Eisini fer hann at koma inn á spurningin um pubertetin. Fleiri kanningar hava nevniliga víst, at fleiri av ættleiddu børnunum koma fyrr í kynsbúningar aldur enn onnur børn.

Ætlanini er, at fundarfólki skal fáa høvi at seta spurningar og skifta orð um evnini.

Málbólkurin er serliga foreldur at ættleiddum og vaksin ættleidd, menn onnur áhugað eru eisini vælkomin. Seinasta freist at tekna seg, er mikudagin 20. Oktober. Hetta kann gerast við at senda ein t-post til amp@post.olivant.fo ella at ringja á tlf 518328 ella 318328. Kostnaðurin er 50 kr fyri hvønn.

Neyðugt er ikki at vera limur í felagnum frammanundan, men Ættleiðingafelagið vónar, at fleiri vilja tekna seg sum lim ella stuðulslim. Hetta kann gerast við at gjalda á kontoi pengingastovnunum: 300 kr. fyri familjur, 150 kr. fyri einstaklingar og 100 kr. fyri stuðulslimir.

Fleiri upplýsingar um ættleiðingafelagið eru at finna á heimasíðuni www.aettleiding.fo

**eys**



*Tilvildarlig mynd*

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM




BUSSFERÐ TIL HETLANDS

**Nú hevur tú møguleika fyri at koma við á eina hugnaliga og áhugaverda bussferð til Hetlands. Farið verður av Havnini hóskvøld og komið verður aftur mánamorgun.**

Fráferð av Havnini: hóskvøld 2. desember kl. 22.00
Koma Lerwick: fríggjadagin 3. desember kl. 12.00
Fráferð Lerwick: sunnudagin 5. desember kl. 13.30
Koma á Havnina: mánadagin 6. desember kl. 05.00

ÚTFERÐARMØGULEIKAR

**Suðurmeginlandið** – fríggjadag kl. 13.00

Á hesum túrinum er m.a. møguleiki at síggja Scalloway Castle, Sumburgh Head og Jarlshof, har nógvar forvitnisligar fornleivdir eru at síggja.

**Norðurmeginlandið** – leygardag kl. 13.00

Á hesum túrinum er m.a. møguleiki at síggja Tingwall, Lunna Kirk, sum er elsta kirkjan í Hetlandi, ið framvegis verður brúkt og hvussu Hetlendingar gera sínar eyðkendu og vakru prýðislutir.

**Prísur fyri hvønn** úr 2.495,-

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggjukamari við wc/bað, innan, 2 nætur á Shetland Hotel í dupultkamari við wc/bað. Á hotellinum er íroknaður morgunmatur og døgurði á kvøldið. Hartil føroyskur bussur, útferðir og føroyskt talandi ferðaleiðari á útferðunum.

SMYRIL LINE

W W W . S O S I A L U R I N . F O

Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

Hvítu síður

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

Gulu síður

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming.................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo
FØROYATELE